FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Tórshavn, tann: 10. mars 2026
j.nr.: 26/04697

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-092/2025 frá Steffani Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um kostnaðin av grønum stuðulsskipanum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við mvg afturbering, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

2. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við lægri skrásetingargjaldi, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

3. Hvussu nógvir el-, vetnis- og hybridbilar eru seldir, síðani stuðul er latin til hesar og tey 5 árini undan, býtt á ár?

4. Hvussu nógv hevur tað kostað landskassanum at lata el- og vetnis bilum lægri vektgjøld, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk?

5. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla hitapumpuskipanum og jarðhitaboringum við mvg afturbering, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

6. Hvussu nógvar hitapumpur eru seldar, og hvussu nógv jarðhitahol eru boraði, síðani stuðul er latin til hetta og tey 5 árini undan, býtt á ár?

7. Hvussu nógv metir Fíggjarmálaráðið, at allar tær grønu stuðulsskipanirnar hava kostað landskassanum, frá tí at tær blivu settar í verk til dagin í dag?

8. Allar grønar stuðulsskipanir vera fasaðar út, undantikið stuðulin sum el- og vetnisbilar fáa í vegskattinum. Ætlar landsstýriskvinnan at gera nakað við hetta?

Svar:

Til nr. 1
Beinleiðis kostnaðurin fyri landskassan av at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við afturbering av meirvirðisgjaldi er vístur í talvu 1 niðanfyri.

Talva 1

	2017	*2018*	*2019*	*2020*	*2021*	*2022*	*2023*	*2024*	*2025*
Afturrindan av MVG, akfør (mió. kr.)	0,5	3,6	3,1	6,0	22,9	32,3	31,4	38,7	20,7

Kelda: TAKS.

Viðmerkjast skal, at *beinleiðis* kostnaðurin, sum er vístur í talvu 1, vísir ikki neyðturviliga *samlaða kostnaðin netto* fyri landskassan, sammett við um landskassin *ikki* hevði stuðlað elbilum yvirhøvur.

Til ber ikki at siga, hvussu inntøkurnar hjá landinum frá meirvirðisgjaldinm *høvdu verið*, um ongar tílíkar stuðulsskipanir vóru, tí til ber ikki at siga, hvørjir bilar *høvdu verið seldir*, um elbilar *ikki* vórðu stuðlaðir við afterbering av meirvirðisgjaldi.

Víst verður eisini til skrivligan fyrispurning nr. 52-052/2023.

Til nr. 2
Til ber ikki at meta um *beinleiðis* kostnaðin fyri landskassan av at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við lægri skrásetingargjaldi. Til ber ikki at siga, hvussu inntøkurnar hjá landinum frá skrásetingargjaldinum *høvdu verið*, um *ongar* tílíkar stuðulsskipanir vóru. Til ber ikki at siga, hvørjir bilar høvdu verið seldir, um elbilar *ikki* vórðu stuðlaðir við afterbering av meirvirðisgjaldi.

Harafturat eru gjørdar somikið nógvar ymiskar broytingar í skrásetingargjaldinum á ymisk sløg av akførum síðstu umleið 10 árini, at til ber ikki at skilja ávirkanirnar av teimum ymisku broytingunum sundur.

Frá 2017 til 2021 vóru inntøkurnar hjá landskassanum frá skrásetingargjaldinum millum 160 og 185 mió. kr. árliga. Síðani 2021 hava inntøkurnar frá skrásetingargjaldinum verið lægri, úr 70 mió. kr. árliga til um 130 mió. kr. í 2025. Ein orsøk til, at inntøkurnar eru minkaðar síðstu árini, er, at sølan av nýggjum akførum sum heild er minkað.

Víst verður eisini til skrivligan fyrispurning nr. 52-052/2023.

Til nr. 3
Talva 2 vísir uppgerð av, hvussu nógvir *nýggir* el- og hybridbilar eru seldir, býtt á ár. Metingar eru ikki tøkar fyri onnur ár. Eingin nýggjur vetnisbilur er skrásettur síðstu árini. Bólkurin hybridbilar í talvuni fevnir um *bensin-*, og *diesel-hybrid* bilar og um *bensin-plug-in-hybrid* bilar. Skrásetingar av hybrid bilum eru ikki tøkar fyri árini fyri 2019. Talva 2 vísir ikki skrásetingar av innfluttum brúktum bilum.

Talva 2

	2016	*2017*	*2018*	*2019*	*2020*	*2021*	*2022*	*2023*	*2024*	*2025*
Elbilar, nýggir skrásettir	4	15	59	66	125	267	453	432	594	361
Hybridbilar, nýggir skrásettir	-	-	-	17	103	749	563	477	153	221

Kelda: Akstovan.

Til nr. 4
Til ber ikki at siga neyvt, hvussu nógv tað hevur kostað landskassanum at lata elbilum lægri vektgjøld, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk. Til ber ikki at siga, hvussu inntøkurnar hjá landinum frá vektgjaldinum *høvdu verið*, um elbilar *ikki* vórðu stuðlaðir, og til ber ikki at siga, hvørjir bilar høvdu verið seldir, um elbilar *ikki* vórðu stuðlaðir.

Til og við 2020 vóru elbilar undantiknir at rinda vektgjald. Síðani 2021 hava elbilar rindað 1.500 kr. árliga í vektgjaldi. Bensin- og dieseldrivnir bilar rinda úr 2.000 kr. og upp til 7.000 kr. árliga í vektgjaldi alt eftir útláti av CO2 og alt eftir, um talan er um bensin- ella dieselbil.

Skrásettir eru í Føroyum 2.946 elbilar sum persónbilar og 131 elbilar sum vøruvognar (1. februar 2026).

Til nr. 5
Beinleiðis kostnaðurin fyri landskassan av at stuðla at stuðla hitapumpuskipanum og jarðhitaboringum við mvg afturbering er vístur í talvu 3. Uppgerð av kostnaðinum av afturberingini er bara tøk fyri hitapumpuskipanir og jarðhitahol tilsamans.

Talva 3

	2017	*2018*	*2019*	*2020*	*2021*	*2022*	*2023*	*2024*	*2025*
Afturrindan av MVG, upphiting (mió. kr.)	0,7	2,4	3,9	5,1	6,7	11,6	28,5	55,3	19,5*

Kelda: TAKS.
Viðmerking: *Árið 2025 er ikki endaliga gjørt upp. Talið fyri 2025 skal tí lesast við fyrivarni.

Viðmerkjast skal, at *beinleiðis* kostnaðurin, sum er vístur í talvu 3, vísir ikki neyðturviliga *samlaða kostnaðin netto* fyri landskassan, sammett við um landskassin *ikki* hevði stuðlað grønum skipanum til upphiting yvirhøvur.

Til ber ikki at siga, hvussu inntøkurnar hjá landinum frá meirvirðisgjaldinm *høvdu verið*, um ongar tílíkar stuðulsskipanir vóru, tí til ber ikki at siga, hvørjar íløgur húsarhald *høvdu gørt* ístaðin og

hvørjar inntøkurnar av meirvirðisgjaldi *høvdu verið* av øðrum íløgum, millum annað í grønar og aðrar hitaskipanir.

Víst verður eisini til skrivligan fyrispurning nr. 52-052/2023.

Til nr. 6
Talva 4 vísir meting av, hvussu nógvar hitapumpur (luft til vatn) eru seldar og hvussu nógv jarðhitahol eru borað, býtt á ár. Metingar eru ikki tøkar fyri onnur ár.

Talva 4

	2015	*2016*	*2017*	*2018*	*2019*	*2020*	*2021*	*2022*	*2023*	*2024*	*2025*
Jarðhitaskipanir	44	58	80	109	151	232	295	773	286	340	-
Hitapumpur (luft til vatn)	50	50	5	15	34	70	62	174	714	901	-

Kelda: Umhvørvisstovan.

Til nr. 7
Til ber ikki at meta um samlaða kostnaðin fyri landskassan av øllum teimum grønu stuðulsskipanunum. Til ber ikki at siga, hvussu inntøkurnar hjá landinum høvdu verið, um ongar tílíkar stuðulsskipanir vóru, tí til ber ikki at siga, hvørjar skipanir høvdu verið seldar í staðin, um grønu skipanirnar ikki vórðu stuðlaðar. Hetta er galdandi bæði tá ið umræður akfør og hitaskipanir. Til ber heldur ikki at siga, hvørjar aðrar íløgur húsarhald høvdu gjørt ístaðin á øðrum økjum og hvørjar avgjaldsinntøkurnar hjá landskassanum høvdu verið av tí.

Víst verður eisini til skrivligan fyrispurning nr. 52-052/2023.

Til nr. 8
Ætlanin hevur verið at endurskoða verandi vegskattaskipan. Hetta arbeiðið er tó ikki liðugt enn. Víst verður til Løglistan 2025 í *Frágreiðing løgmans á ólavsøku 2025*.

Tinganes, 10. mars 2026

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum